# Nakrar hundrað millionir í umfari



*Hákun Steingrímsson er væl nøgdur við gongdina higartil. Landsbankin hevur havt umboðskrivstovu á føroyska marknaðinum í eitt gott ár nú, og teir hava nakrar hundrað milliónir krónur í umfari í Føroyum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Hákun Steingrímsson er umboðsmaður hjá íslendska bankanum Landsbanki, ið telist millum teir tríggjar stóru bankarnar í Íslandi. Teir hava fyri ári síðani víðkað heimamarknaðin til eisini at umfata Føroyar, og hava nú lutfalsliga fáar, men stórar kundar í landinum**

BANKAVIRKSEMI

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

- Hví tað júst var eg, sum fekk bjóðað at gerast umboðsmaður Landsbankans í Føroyum veit eg ikki. Tað mást tú spyrja onnur um.

Soleiðis svarar Hákun Steingrímsson, tá vit spyrja hann, um tað er hansara kunnleiki til føroysku reiðaríini sum hevur gjørt, at tað bleiv hann, ið fekk starv hjá íslendska bankanum.

Sum kunnugt hevði Hákun Steingrímsson verið leiðari á sjóvinnudeildini hjá Tryggingarfelagnum Føroyar, og má tí roknast at hava gott samband við føroysku reiðaríini.

Ikki tí. Landsbankin fæst við annað enn at fíggja virksemi, ið er tengt at sjónum, men tað er fyrst og fremst sjóvinnudeildin hjá bankanum, sum víðkar sítt virksemi til Føroya.

Landsbankin hevði eitt ávíst virksemi í Føroyum framman undan, men tað var serliga avbjóðingin í sambandi við ætlaðu privatiseringarnar sum gjørdu, at íslendski bankin valdi at koma sterkari inn á føroyska marknaðin fyri ári síðani.

- Tað var serliga »Corporate Finans«-deildin, ið ynskti at sleppa inn á marknaðin í sambandi við at gera prospektir og annað í sambandi við privatiseringarnar, men tað bleiv ikki so nógv av tí, tá til stykkis kom. Men eisini í sambandi við Corporate Banking, tað vil siga tá tað kom til at lána pening í hesum sambandi, var áhugi frá íslendskari síðu, sigur Hákun Steingrímsson.

Tað er nú gott og væl eitt ár síðani, at hann tók við starvinum sum umboðsmaður hjá Landsbankanum í Føroyum, og hann er væl nøgdur við gongdina higartil.

- Bankin leggur seg serliga eftir stórum kundum, omanfyri 10 milliónir helst. Tað er dýrt at flyta pening millum lond, og tí má upphæddin vera av einari ávísari støddi, fyri at tað skal løna seg, sigur Hákun Steingrímsson.

## Stert ella kvotur

Tá Hákun fyri góðum ári síðani varð settur í starv hjá Landsbankanum, var tað nógv, sum hann mátti seta seg inn í.

- Eg eri jú ikki bankamaður av profession, so tað var ein rúgva at seta seg inn í. Ikki tí, eg havi ikki møtt so øgiliga mongum bankamonnum í mínum arbeiði. Hinvegin kendi eg jú marknaðin fyri ein stóran part framman undan, sigur Hákun Steingrímsson.

Tað er fyrst og fremst tað, sum hevur við sjógvin at gera, sum Landsbankin er áhugaður í her á landi, men áhugi er fyri størri vinnufyritøkum í síni heild.

- Bankin er áhugaður í øllum størri fyritøkum, men serliga teimum, sum hava við sjógvin at gera. Mann kann siga tað soleiðis, at er talan um stert ella kvotur, eru vit beinanvegin klárir, sigur Hákun Steingrímsson.

Tað er kortini ikki soleiðis, at Landsbankin er í »heads-on« kapping við aðrar peningastovnar alla tíðina.

- Tað kann eisini verða so, at tað eru uppgávur, sum aðrir peningastovnar ikki vilja taka upp á seg einsamallir, og tá kunnu vit so koma inn í myndina, sigur Hákun Steingrímsson.

Men fyrst og fremst er tað altso skip og virkir, ið hava við sjógvin at gera, sum umboðsmaðurin hjá Landsbankanum í Føroyum tekur sær mest av.

## Stór útlán

Deildin í Føroyum er ikki ætlað at verða ein rættilig bankadeild, men heldur ein umboðsskrivstova.

- Eg skal bara taka mær av samskiftinum við kundarnar, so tað er ikki neyðugt við fleiri fólkum á skrivstovuni. Eg seti meg í samband við kundar, ella teir seta seg í samband við meg, og síðani geri eg eina innstilling til leiðsluna í Íslandi. Í hesum elektronisku tíðum ber jú næstan alt til, sjálvt um fjarstøðan er stór, sigur Hákun Steingrímsson.

Hann sigur, at hann í so máta dúvar nógv meiri upp á íslendska baklandið, enn hann annars hevði gjørt, um tað hevði verið ein rættilig undirdeild í Føroyum.

Annars heldur Hákun Steingrímsson ikki, at Landsbankin er áhugaður í at uppkeypa hálvalmennu føroysku feløgini, ið eru ella standa fyri at verða privatiserað.

- Mær vitandi hevur Landsbankin ikki keypt partabrøv í Føroya Banka ella Eik, og eg kenni ikki nakað til, at áhugi skuldi verið at keypt partabrøv í Føroya Tele ella Atlantsflog, tá tey verða partvís privatiserað. Men at teir kunnu hava fíggjað onkran, sum hevur ella ætlar at keypa partabrøv, tað kann sjálvandi væl vera, sigur Hákun Steingrímsson.

Hann er annars væl nøgdur við gongdina hjá umboðsstovuni higartil. Landsbankin hevur fingið nakrar kundar aftrat seinasta árið, og hóast talið á kundunum er lutfalsliga lítið, er talan um rættiliga stórar upphæddir.

- Jú, eg haldi at tað er á einari leið. Vit hava nakrar hundrað milliónir í umfari í Føroyum, og tað meta vit vera nøktandi eftir tíðini, vit hava virkað á føroyska marknaðinum, sigur Hákun Steingrímsson.




*Íslendski Landsbankin heldur til í Nólsoyarstovu*